# Tekniskt brek seinkar Norrønu

**Tekniskt brek umborð á Norrønu gjørdi seinnapartin leygardagin at Norrøna legði at aðra bryggju enn hina vanligu í havnini í Hanstholm. Ferðafólk og farmur vóru seinkaði.**

FERÐAVINNA
*Rókur Jákupsson Jacobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Norrøna hevði trupulleikar við tí eini skrúvuni og hetta gjørdi tað torført at stýra skipinum. Ein týskur serfrøðingur kom sunnumorgunin at hyggja uppá skrúvuna. Hann staðfesti skjótt feilin, og nú eru lutirnir skiftir. Sostatt er Norønna klár at taka siglingina upp aftur.

Thomas Magnusen, stjóri á Smyril Line harmast um seinkingina.

–Nú hava vit mist eitt døgn, og tað er harmiligt,sigur hann. Vit rokna við, at Norønna er aftur í Havn týsmorgun klokkan 04, men vit kunnu ikki siga tað við vissu, tí at vit ikki eru heilt greið yvir, hvussu veðrið fer at skikka sær, sigur hann við Sosialin.

## Nøgdur týskari

Ein skuldi trú, at ferðafólk ilskaðist av seinkingini hjá Norrønu, men ein týskari skrivar á eini heimasíðu, at hann var ovfarin av blíðskapinum, sum hann og konan hittu umborð.

Eitt týskt par hevur júst verið í Føroyum, og ferðin heim aftur gjørdist drúgvari enn tey høvdu roknað við. Men hetta bilti onki. Mattias og kona hansara vóru ovfarin av blíðskapinum umborð á skipinum. Hann skrivar nakað soleiðis: ”Eftir at vit høvdu fingið kaffi og køkur seinnapartin, vóru vit boðin til eina ovurstóra buffet. Her kundu vit eta so nógv sum vit orkaðu. Og alt hetta var ókeypis”, sigur Mattias. Hóast teknisk brek og illveður, heldur hann at Smyril Line gjørdu alt tey kundu, fyri at ferðafólkini skuldu hava tað gott umborð. Hetta er hann takksamur fyri.



*Norrøna hevði tekniskt brek á skrúvuni í vikuskiftinum.*

Mattias skrivar eisini at hann og konan eru sera glað fyri ferðina í Føroyum. “Vit vóru í Føroyum í 4 dagar, og har var fantastiskt. Onki land hevur nakrantíð ávirkað okkum so ógvisligt, sum hesar oyggjar hava”.

Tey sum vilja lesa alla frágreiðingina á týskum kunnu klikkja seg inn á: http://forum.faroe-islands.de/phpBB2/viewtopic.php?p=886

Starvsfólk
TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

Aftaná skúlatíð
Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16–25 ár til at arbeiða aftaná skúlatíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 16.00 og 24.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.

SUNSET Boulevard

Vit hava fingið veingir



ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK

SBW Express bjóðar dygdargóða flogfrakt tænastu til ein kappingarføran prís.



Ring á telefon nr. 345960 ella 545970
ella skriva á teldupost cargo@sbwcargo.com

...Skjótasta flutningstænasta á Norðuratlantshavi !

SMYRIL BLUE WATER